# Kjak



Helgi Abrahamsen
*løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin*

## Roynir at framleiða ein nýggjan sannleika

*Nú má Høgni Hoydal halda uppat við at lúgva um Stjórnarskipanaruppskotið*

Umaftur og umaftur sigur Høgni Hoydal, at full semja var um stjórnarskipanaruppskotið fyri einum ári síðani. Hetta sigur hann í løgtinginum og hetta sigur hann í fjølmiðlunum, hóast hann fullvæl veit, at veruleikin er ein annar.

### Skrivaði sjálvur undir

Nevndin, sum fyri einum ári síðani legði uppskot fyri tingið um stjórnarskipan, hevði til uppgávu at gera EITT uppskot, sum síðani skuldi fáa vanliga tingviðgerð, áðrenn tað fór til fólkaatkvøðu. Boðini vóru, at tað bar ikki til at gera minnilutaálit. Vit skuldu finna semju um EINA orðing. Men vit vistu allir í nevndini (eisini Høgni Hoydal), at vit vóru ikki samdir um alt. Tí varð skrivað í viðmerkingunum til uppskotið: "Hóast nevndin leggur eitt felags uppskot fram, eru nevndarlimir, sum í tingviðgerðini vilja gera vart við serstøðu í ávísum greinum."

Ein av teimum sum skrivaði undir uppskotið (og tískil eisini hesa orðingina) var Høgni Hoydal.

Undir viðgerðini av uppskotinum, fyri einum ári síðani, nevndi eg millum annað, at tað fór av verða neyðugt at skriva inn í lógina, hvar hon skuldi standa í mun til aðrar lógir, og at tað eisini fór at verða neyðugt at definera, hvar vit stóðu sum samfelag (í mun til ríkisfelagsskapin). Hetta var alt greitt longu fyri einum ári síðani.

### Hevur brúk fyri lygnini

Høgni Hoydal kann tíverri ikki brúka henda veruleikan til nakað. Hann hevur brúk fyri at kunna siga, at meirilutin í nevndini er boygnaður fyri trýsti úr Danmark. Og hetta er tað, sum nú verður endurtikið og endurtikið.

Eg royndi at gera vart við hetta, tá stjórnarskipanaruppskotið varð til 2. viðgerð, mánadagin, men tað var sum at sletta vatn á gás, og nú hoyra vit somu ósonnu søguna umaftur í Útvarpinum.

Nei tað er hvørki ríkisfundurin í Skagen, Føroyavitjanin hjá Løkke, ella eitt notat frá danska løgmálaráðharranum, sum hevur flutt stjórnarskipanarnevndina. Vit vistu longu fyri einum ári síðani, hvørjar orðingar máttu broytast.

### Jákup Mikkelsen vil sleppa at slaka

Ein av teimum, sum á tingfundinum, mánadagin, vildi hava málið aftur í nevnd, var Jákup Mikkelsen. Hann segði henda dagin í tinginum, at Sambandsflokkurin hevði slakað mest undir nevndarviðgerðini. Um hann veruliga meinar tað, so gangi eg út frá, at hann eisini heldur, at túrurin nú er komin til onkran annan at slaka, nú hann sigur seg vilja sleppa at "mýkja støðuna". Og sjálvandi – er tað tað hann vil, so skal hann vera vælkomin at slaka meira. Men mín støða er framvegis tann sama, sum hon var fyri einum ári síðani, tá nevndin var samd um nógv, men ikki alt.

## SU á fundi við MBF

Umstøðurnar hjá teimum, ið bera brek í Føroyum, er eitt evni, ið SU raðfestir høgt og ynskir at arbeiða fyri. Fyri at fáa innlit í, hvussu støðan er, og hvussu hesin bólkur hevur tað í Føroyum, var SU í gjár á fundi við forkvinnuna og dagliga leiðaran í MBF.

MBF talar sak teirra brekaðu, ið er ein sera breiður skari av fólki. T.v.s. fólk. ið eru fjølbrekað, førleika skerd, fólk við menningartarni, lesi og skriviveik o.s.fr. Hóast ymisku brekini hava allir bólkar í MBF tað til felags, at tey til ein og hvørja tíð mugu berjast fyri rættindum, ið eru ein sjálvfylgja fyri flest onnur.

Á fundinum við MBF fingu vit millum annað at vita; at tað í fjør søktu umleið 70 fólk, ið vóru lesi og skriviveik, inn á Dugna við Áir. Forkvinnan í MBF veit at siga, at okkurt um helvtin at hesum vóru ung, og at hesi 70 væntandi bara er toppurin á ísfjallinum – tey, ið tora at biðja um hjálp. Hon legði afturat, at ung við breki so gott sum einki útbúgvingartilboð hava í Føroyum, tá tey koma úr fólkaskúlanum; at vit framvegis hava skúlar og stovnar, ið ikki eru atkomiligir hjá fólki, ið eru rørslutarnað; at tað eru 70 fólk við menningartarni, ið vanta bústað; at tað er sera trupult hjá teimum, ið fáa fyrtíðarpensjón og tí eru í láglønarbólkinum, at fáa ein virðiligan bústað, tí tey ikki kunnu fáa serligar bústaðir og lán.

Eftir fundin við MBF, eru vit í SU vorðin enn meira sannførd um, at vit eiga at fáa hagtøl í Føroyum, ið geva okkum eina greiðari fatan av, hvussu nógv ung við breki ikki hava nakað útbúgvingar- ella skúlatilboð. Hvussu nógv fólk eru, ið ikki hava møguleika fyri at fáa ein bústað. Hvør er tørvurin hjá teimum 70, ið standa á bíðilisti til bústovn og sambýli runt um í landinum. Men mest av øllum eiga vit at spyrja, nær og hvussu fara vit undir at byggja bústaðir til tey mongu, ið ikki hava møguleika fyri at spæla við á sethúsamarknaðinum í Føroyum, og hvussu skal hetta skipast og fíggjast?

Nakað av tí, ið kom fram á fundinum, vistu vit áðrenn, ella høvdu varhugan av. Kortini var tað okkurt, ið veruliga fekk okkum at steðga á og spyrja: Hvat er tað, ið vit lata ganga í okkara vælferðarsamfelag, ið EIGUR at vera fyri øll?

Sum útgangsstøði er fólkaskúlin, fyri øll. Vit í SU meina, at eisini samfelagið eigur at vera fyri øll. Tað eigur at vera ein mannarættur, at hava okkurt at fara til og ikki minst at hava ein bústað.

Vit í SU meina, at vit í fyrsta umfari eiga at seta pening av til at gera eina kanning á økinum. Út frá henni eiga vit at orða visjón "Samfelagið fyri øll"

**SU**



Halla Samuelsen
*býráðslimur og forkvinna í sosialu nevnd Tórshavnar býráðs*

## Sosiala nevnd kunnar seg um nýggja Barnatannlæknastovu og um eldraíbúðir

Eitt av málunum, sum sosiala nevnd í løtuni arbeiðir við, er at betra munandi um umstøðurnar hjá Barnatannlæknastovuni.

Sosiala nevnd samtykti tann 1. desember 2009 at taka undir við tilmæli um, at kommunala barnatannrøktin framyvir skal skipast sum sentralklinikk, har eisini serviðgerðir – ella sonevnda ortodontiin, verður beinleiðis partur av stovninum og í hølum, sum eru gjørd og hóska til endamálið.

Tað er eingin loyna, at barnatannrøktin hevur trongligar umstøður í Tórsgøtu. Har er kringlut og lítið pláss, tá børn ofta saman við foreldrum skulu til tannlækna. Barnatannrøktin hevur børn í aldrinum 0 til 16 ár, og umleið 5.000 børn eru knýtt at tí kommunalu tannrøktini.

Síðani 2002 hevur kommunan havt avtalu við privat virki um ortodontiina, ið er lógarkravd kommunal tænasta. Tað eru umleið 900 børn, sum hvørt ár eru knýtt at sertannlæknastovuni, men ætlanin er, at Barnatannlæknastovan framyvir sjálv skal standa fyri hesum partinum av barnatannrøktini.

Í hesum sambandi er eisini ætlanin, at byggjast skal nýggj Barna-tannlæknastova sum sentralklinikk, ið framyvir skal verða karmur um allar tær kommunalu barnatannrøktartænasturnar.

### Nýggir eldrabústaðarmøguleikar

Annað mál, ið sosiala nevnd í sínum arbeiði raðfestir sera høgt, er at fáa til vega nýggjar bústaðarmøguleikar til eldri.

Samstundis sum býráðið tók endaliga avgerð um at byggja Boðanesheimið við 64 røktarheimsbúplássum, avgjørdi sosiala nevnd at seta í gongd arbeiði at útvega fleiri eldrabústaðir, sum serliga eru ætlaðir til tann stóra bólkin av eftirløntum, ið ikki hevur tørv á røktarheimsplássi, men á einum hóskandi eldrabústaði – eitt nú íbúð á einum eldradepli við atknýttum starvsfólki til lætta røkt, ítriv v.m.

Sum liður í fyrireikingini av hesum báðum málum, fer sosiala nevnd í næstu viku á kunningarferð.

Týsdagin verður vitjað í ávikavist Aalborg kommunu og Frederikshavn kommunu, har nevndin fær kunning um teirra barnatannrøktarskipan og sentralklinnikk. Mikudagin verður vitjað í Viborg kommunu og Billund kommunu, har evnið er kommunala eldrarøktin sum heild, men við serligum denti á eldraíbúðum, fígging, visitatiónsskipan og atknýttum tænastum v.m.